Havstovan/Fuglakanningarstøðin
Nóatún 1
100 Tórshavn

# Kanning av føroyska grágásastovninum.

Tal og ferðing hjá Føroysku grágásini.

Jóhannis Danielsen og Leivur Janus Hansen

## Inngangur

Grágásin var partur av føroysku náttúruni, til fyri uml. 200 árum síðan. Svabo skrivar í 1781-82 at "Denne fugl var for 50 år siden temmelig almindelig i Færøe, men er nu næsten aldeles ødelagt, deels formedelst den Jagt..." tvs at grágasin var vanlig uml. ár 1730, men var síðan meir ella minni avoydd, helst orsaka av ov høgum veiði trýsti. Men seinastu árini er hon komin fyri seg aftur, og er tað tí av stórum týdningi at kanningar verða gjørdar av hvussu stovnurin er fyri, og av stovns stødd; bæði frá ári til árs, men eisini ymsu tíðina av árinum.

Eins og mong onnur lond, hava Føroyar bundi seg til ymsar sáttmálar viðvíkjandi verju av náttúru og margfeldi, og at gera sítt til at steðga um minkingina av margfeldi í náttúruni. Av tí at grágásin fyrr hevur verði partur av føroysku náttúruni, sum nú er komin fyri seg aftur, er ein tílík kanning heilt í trá við áður nevndu sáttmálar og t.d. nummar 15 av heimsmálunum hjá ST, fyri burðardyggari menning, ið snýr seg um "Lívið á landi".

Í 2014 var Fuglaveiðulógin (Ll. 27 frá 9/9/1954) broytt, so eigari og leigari av veltum lendi kundi søkja um loyvið at skjóta grágæs. Við somu lógarbroyting varð álagt Landsstýrismanninum at stíla fyri, at kanningar og vísindaligar teljingar av grágæs verða framdar.

Í hesum sambandið var fundur hildin, tann 6 februar 2017 á Búnaðarstovuni, fyri at viðgera umbøn frá landsstýrismanninum í landbúnaðarmálum og Fiskimálaráðnum, at fáa kanna møguleikarnar fyri eini tílíkari kanning. Umrøtt var hvussu ein teljing av grágásastovnin í Føroyum kundi verði gjørd, bæði við atliti at tíð, vavi og kostnaði, og hvussu ein tílík kanning kundi nýtast sum grundarlag undir eini stovnsmeting.

Avgjørt var at ein tílík kanning eigur at fevna um fleiri teljingar ígjøgnum árið. Fyrst í mars-apríl mána, tá parlagið verður markera, men undan reiðringini. So aftur juni-juli, áðrenn ungarnir eru floygdir og so aftur í oktober-november. Avgjørt var at teljingarnar um várið og heysti, eiga at verða gjørdar samstundis sum grágásateljingar verða gjørdar í Íslandi og Bretlandi. Endamálið við at gera føroysku teljingina samstundis, sum talt verður í Íslandi og Bretlandi, er at fáa hilling á hvussu stórur partur av samlaða stovninum steðgar á í Føroyum hesa ársins tíðir, tá gásin ferðast ávikavist úr Bretlandi til Íslands um várið, og so aftur til Bretlands um heysti.

Havstovan/Fuglakanningarstøðin
Nóatún 1
100 Tórshavn

Aftrat teljingunum í juli, skuldi eitt ávíst tal av gás fangast og merkjast við hálsringum (Mynd 1), ið kundu avlesast við kikara. Endamálið við eini tílíkari merking, er fyri at vita hvussu nógv og víða gásin ferðast runt um í Føroyum. Tílík vitan er avgerandi fyri at fáa álítandi tøl fyri stovnsstødd. Eisini hevði tað gjørt tað møguligt at fingi vitan um hvar føroyska gásin ferð um veturin.




Mynd 1. Grágás merkt við hálsringi.

Víðari var mett at neyðugt var, at kanningin var endurtikin árliga, helst 5 ár á rað, fyri at fáa greiðu á árligu sveiggjini í stovninum. Eftir hetta kann teljingin gerast 5 hvørt ár, so fylgjast kann við stovninum. Men til at byrja við var ein 3 ára kanningar ætlan løgd, og var metti kostnaðurin um 300.000 krónur til hetta arbeiði.

Í 2018 var søkt um 175.000 krónur til teljingar og merking av uml. 200 gæs. Men av tí at játtanin var 150.000 krónur, og ikki kom fyrr enn væl var ligið út á árið, máttu ymsar broytingar og tillagingar gerast, sum komu at ávirka arbeiðs ætlan og gongd í 2018 nakað.

## Arbeiðsháttur og úrslit

Upprunaliga ætlanin var at hava fyrstu telling av grágás í mars-apríl 2018, tá tær byrja at finna saman í pør, men áðrenn tær eru farnar í hagan. Næsta teljing skuldi so verði í juni-juli 2018, tá vaksnu gæsnar eru fjaðursárðar, og ligga á vøtnum við ungunum. Hetta gevur eisini møguleika at telja ungarnar, og harvið hvussu nógv kemur undan. Men orsaka av at fíggingin til verkætlanina kom so mikið seint, var ikki møguligt at gera teljingina um várið 2018. Fyrsta teljing var tí um summarið, og so aftur um heysti, samstundis sum talt var í Íslandi og Bretlandi. Í 2019 var talt bæði um várið og heysti, men einki kanningar arbeiði var gjørt um summarið, tí eingin fíggjing var longur tøk til verkætlanina. Orsaka av væntandi fíggjing endaði verkætlanin tískil við teljingini sum var um heysti, 2019.

Allar teljingar vóru skrásettar á einum korti yvir Føroyar. Á mynd 2 sæst hvar í landinum teljingarnar í 2018 og 2019 vóru gjørdar. Tað var ymiskt hvussu talt var, og hvussu nágreiniliga upplýst var, hvar teljingin var gjørd. Í summum førum hevði teljari koyrt eina ávísa leið, og talt alt hann/hon sá á leiðini. Í øðrum føri var eitt ávíst punkt ella staðarnavn givið, og við hvørt var alt økið, ið var talt, tekna á eitt kort.

Havstovan/Fuglakanningarstøðin
Nóatún 1
100 Tórshavn









Havstovan/Fuglakanningarstøðin
Nóatún 1
100 Tórshavn






Havstovan/Fuglakanningarstøðin
Nóatún 1
100 Tórshavn




Mynd 2. Yvirlit yvir hvar í landinum teljingarnar av grágás vóru gjørdar í 2018 og 2019.

Á sumri 2018 var talt á 13 ymsum vøtnum, firðum og vatngoymslum runt um landið, har mann veit at grágás samlast. Samlaða talið var 821 grágæs. Hendan teljing var gjørd við bæði kikara og dronu (Mynd 3).

Um heysti, 2018 var talt á 70 ymsum støðum á níggju oyggjum, og samlaða talið var 1000 grágæs (Talva 1). Íalt 21 fólk tóku lut í hesi teljing.

Havstovan/Fuglakanningarstøðin
Nóatún 1
100 Tórshavn




Mynd 3. Grágásateljing á Toftavatnið, við dronu.

Í mars, 2019 var talt á 79 ymsum støðum á 7 oyggjum, og samlaða talið var 789 grágæs (Talva 1). Íalt 15 fólk tóku lut í hesi teljing. Í November, 2019 var talt á 80 ymsum støðum á 8 oyggjum, og samlaða talið var 689 grágæs (Talva 1). Íalt 13 fólk tóku lut í hesi teljing.

Talva 1. Samlað tal av grágás tald í ymsu oyggjunum í 2018 og 2019. Tal av støðum er í hvussu nógvum ymsum støðum talt var á, á hvørjari oyggj.

| 2018 | Tal av: | |
|---|---|---|
| Oyggj | Støðum | Grágás |
| Norðoyggjar | 1 | 25 |
| Eysturoy | 11 | 6 |
| Norðurstreymoy | 7 | 72 |
| Suðurstreymoy | 20 | 257 |
| Nólsoy | 2 | 78 |
| Koltur | 1 | 124 |
| Vágoy | 9 | 181 |
| Sandoy | 4 | 170 |
| Suðuroy | 15 | 87 |
| Samlað tal | 70 | 1000 |

| 2019 Mars | Tal av: | |
|---|---|---|
| Oyggj | Støðum | Grágás |
| Norðoyggjar | 19 | 11 |
| Eysturoy | 2 | 13 |
| Norðurstreymoy | 20 | 89 |
| Suðurstreymoy | 17 | 162 |
| Vágoy | 7 | 125 |
| Sandoy | 2 | 290 |
| Suðuroy | 12 | 99 |
| Samlað tal | 79 | 789 |

| 2019 November | Tal av: | |
|---|---|---|
| Oyggj | Støðum | Grágás |
| Norðoyggjar | 19 | 23 |
| Eysturoy | 7 | 35 |
| Norðurstreymoy | 13 | 59 |
| Suðurstreymoy | 12 | 175 |
| Koltur | | 70 |
| Vágoy | 7 | 110 |
| Sandoy | | 158 |
| Suðuroy | 10 | 59 |
| Samlað tal | 80 | 689 |

Ein misseydna roynd var eisini gjørd, at fanga og merkja grágás við Toftavatn, summarið 2018. Tá gæs skullu merkjast verður vanligvís ein sokallað “gásafella” sett upp, við eitt vatn har fjaðursárar gæs halda til (Mynd 4). Ein tílík fella var sett upp við Toftavatn tíðliga um summarið 2018, fyri at venja fuglin við felluna. Eisini var fóðra inní felluni við jøvnum millumbilum, og myndatól sett upp fyri at vita hvussu gæsnar uppførdu seg nærhendis felluni. Hesi vístu at tað var serliga í náttarmyrkrinum at gásin kom at fáa sær at eta. Hetta merkti, at man ikki kundi nýta sjálvfangandi fellu, síðan fuglurin hevði verði fangaður alla náttina.

Havstovan/Fuglakanningarstøðin
Nóatún 1
100 Tórshavn




Mynd 4. Gragásafellan við Toftavatn.

Tí var avgjørt at royna at fanga gæsnar um dagin. Hetta var gjørt við at tær fyrst vóru tær riknar yvir um alt vatnið við hjálp av dronum, til tær vóru beint við felluna. Síðan var farið í gummibátar at royna at fáa tær síðsta teinin og inn í felluna. Men tá kom panikkur í, og gæsnar fóru í allar ættir, so ikki eydnaðist at fanga tær á hesum sinni. Men hendan royndin vísti at tað riggaði avbera væl at reka gæsnar við dronu, so tað var ætlanin at royna aftur í 2019. Eisini var ætlanin at flyta felluna til eitt annað, vónandi betur stað.

## Niðurstøður

Uttanlanda verða tílíkar teljingar samskipaðar av einum stovni, ella áhugafelagsskapi, men í stóran mun gjørdar við hjálp frá almenninginum. Trupuleikin við eini tílíkari skipan, er at hon er sárbær fyri órógvi í teljingini, ella tað at teljingin verður ov óskipa. Um okkara leiðir kann veðrið jú verða rættiliga skiftandi, og ofta er regn og kalt, tá teljast skal. Tá er skjótt at folk setast aftur, og tað endar við at summi økir ikki eru við í teljingini. Hetta gevur feilkeldur, og at trupult er at siga nakað við vissu um samlaða talið.

Royndirnar frá teljingunum í 2018 og 2019 hava víst, at um okkara leiðir er neyðugt at man lønar einum ávísum talið av fólkið, til at gera neyvar teljingar um alt landið. Hetta fyri, at vissa kann fáast fyri at talt verður um alt landi, og at øll økið har man metur grágásin heldur til, verða kannaði.

Samstundis meta vit tað verða rættast, at man eins og áður, eisini heitir á almenningin um at hjálpa til. Tað vildi givið betur vissu fyri at øll áhugaverd økir verða tald, men eisini tí man vil geva teimum ið eru áhugaði ein møguleika at verða við. Tað er tíðuligt, at tað er rættiliga stórur almennur áhugi fyri grágásini í Føroyum.

## Tøkk

Stóra tøkk til øll í hjálptu til við teljingunum. Uttan slíka hjálp hevði tað ikki verði møguligt at gjørt eina tílíka teljing um alt landi, og sama dag. Tøkk til Fiskimálaráðið fyri fígging til kanningarnar í 2018 og 2019.